# Summarhúsið

Sarita og Baldur vóru úti í garðinum. Ímeðan sat eg saman við Kristinu inni í tí smala køkinum og lurtaði eftir hennara endaleysa grenji um sjeikin. Vit vóru í summarhúsinum hjá foreldrunum hjá Balduri. Tað var reytt við ljósagráari betonggrund, lítið pláss var, men nokk til at húsa okkum fýra.

Vit høvdu fingið summarferiu fyri einari viku síðan og valdu at fara ein túr til Suðuroyar. "Tað verður feitt!" hevði Baldur sagt við meg brosandi síðsta skúladag. Ja, um tú sigur tað, hugsaði eg fyri meg sjálvan. Baldur, Sarita, Kristina, og eg gingu øll í sama flokki. Baldur og Sarita høvdu havt gott eyga á hvørjum øðrum síðan fyrsta skúladag, ella tað var tað, eg helt.

Eg eygleiddi Baldur og Saritu frá køksvindeyganum. Baldur gav Saritu sín jakka, tí hon hevði gloymt sín inni í húsinum. Tey bæði festu í hvør sína sigarett. Baldur var buldrutur, men samstundis dugnaligur í skúlanum. Hansara hálvlanga, silkimjúka, reyða hár flákraði í vindinum. Hann gekk altíð í ein slitnum ljósabláum kovboyjakka, sum hann hevði arvað frá pápa sínum, og sum pápin hevði átt, síðan hann var líka ungur sum Baldur.

Tað var einki serstakt við Saritu. Hon var tann klassiska ljóshærda, pena gentan í flokkinum, sum allir dreingirnir vildu hava. Hon var heldur ikki tann hvassasti knívurin í skuffuni. Hon var so nett, at hon næstan svam í kovboyjakkanum hjá Balduri. Og ja, ikki at gloyma hennara ótolandi látur, sum kundi hoyrast langan veg.

Kristina var tann frægasta gentan í flokkinum, fitt, eygagóð og altíð smílandi. Hon kom altíð tíggju minuttir ov seint um morgunin við sínum brúna pjøskuta hári og svøvni í eygunum. Hon hevði altíð onkra skemtiliga viðmerking til læraran og fekk okkum øll at flenna í kíki.

"Eru tey ikki fitt!" spurdi Kristina.

"Jú, tað kann man gott siga," segði eg.

Hurðin brast upp. "So er tað ball!" ýldi Baldur, samstundis sum hann helt í einum kassa við øli og einari vodkafløsku, sum hann hevði funnið úti í skúrinum. Sarita tók eina Mango-Monin syrupsfløsku og ein djúspakka úr køliskápinum og setti seg við síðuna av Kristinu. Baldur setti seg við síðuna av mær. "Yessss" segði eg innantanna. Kortini blivu tveitt á

borðið, blandingin gjørd, og playlistin tendraður. So var tað klárt at spæla Vatnfall, sum var mítt yndis drekkispæl.

Eftir eina løtu sótu vit øll við einari stívari kenning. "Kristina, góða kom á wc við mær!" rópti Sarita og valsaði út í gongina og inn á vesið. Kristina fór aftaná.

"Pætur kom og dansa við mær!" rópti Baldur úr stovuni. Eg kvakk við og skundaði mær inn til hansara. Sangurin "Loyndarmál" hjá Byrtu var so hart frá, at alt húsið ristist, og tann dýra Flowerpotlampan, sum stóð á vindeygakarminum, mundi dottið á gólv.

Tá genturnar komu aftur úr vesinum, tók Sarita tók meg til síðis og teskaði í oyra hjá mær

"Heldur tú ikki, at Kristina er nokkso fitt?"

"Jú, tað haldi eg."

"Er hon ikki lekkur?" segði hon gnisandi.

"Altso, hon er ikki heilt mín typa." Eg rullaði við eygunum.

"Kom nú, gev henni ein kjans, hon er so forlipt í tær, sært tú ikki tað?"

"Ja, jú, men ..."

"Steðga nú við hasum tvætlinum."

Sarita tók í hondina á mær, leiddi meg út í skúrin, skumpaði meg inn og smekkaði hurðina aftur. Har stóð Kristina. Hon tók um armarnir hjá mær og skumpaði meg inn ímóti hurðini.

"Kristina, góða steðga."

"Eg veit at tú vilt. Kom nú bara," segði hon, ímeðan hon royndi at taka blusuna av mær.

"STEÐGA NÚ!".

Hurðin brast upp, og vit bæði vóru send um koll. Baldur kom inn eftir meira øl.

"Hvat í helviti sker her? Hvat ólukkan gert tú, Kristina?"

Kristina rann grátandi út. Eg tók synd í henni, men allíkavæl ikki.

"Ert tú okey, Pætur?". Bláu eyguni á Balduri glitraðu.

"Ja, ja, hatta var bara nakað tvætl."

"Ert tú sikkur? Set teg her hjá mær og tak ein sjuss. Eg orki ikki inn aftur til Saritu, tað er tann tíðin av mánanum, tú veit."

"Ja, eg veit."

Eg botnaði restina av vodkafløskuni, og eftir eitt langt prát um lívið, bleiv alt svart.

*

Høvdið kendist, sum mól tað við túsund kilometrum um tíman. Ein stórur klumpur stóð fastur í hálsinum, og ein so ótespiligur smakkur av spýggi var í munninum. Ein sólglotti skein ígjøgnum gardinurnar. Ein bláur kovboyjakki hekk á seingjarstokkinum, og mínar klædningsbuksur lóu á gólvinum. Eg vendi mær við. Reytt hár. Blá eygu. Har lá Baldur beint framman fyri nøsina hjá mær. Fokk. Fokk. Fokk.